# DFDS nýggja ferju

Í síðstu viku setti DFDS eina nýggja ferju inn í siglingini millum Esbjerg og Harwich. Hon eitur »Dana Sirena«. Skipið er 200 metrar langt, 22 metrar breitt og siglir 22 míl.

Nýggja skipið, sum kemur ístaðin fyri »Dana Anglia«, er í fyrsta lagi eitt farmaskip, sum skal nøkta tann veksandi flutningin um Norðsjógvin. Men tørvur er eisini á einum ferðamannaskipi á leiðini, og tí hevur skipið pláss til meiri enn 600 ferðafólk og meiri enn 400 bilar. Nýggja skipið er sera væl útgjørt og nútímans í allar mátar.

Seinastu tíðina er tað vorðið rættiliga bíligt at flúgva millum Danmark og Bretland, men í DFDS siga tey, at tað er kortini tørvur á einum ferðamannaskipi á leiðini. Sum er eru útlitini eisini góð, og rættiliga nógv fólk hava bílagt sær ferðaseðil við »Dana Sirena« í summar, sigur ferðamannastjórin hjá felagnum, Axel Christensen, við blaðið JydskeVestkysten.

# Grønlendingar fáa hjálp

Danska stjórnin ætlar sær nú at hjálpa grønlendingum, sum flyta til Danmarkar.

Henriette Kjær, almannamálaráðharri, er í hesum døgum í Grønlandi og tosar við heimastýrið um, hvat kann gerast fyri at hjálpa teimum grønlendingunum, sum fara til Danmarkar uttan at hava nakað at fara til. Nógvir av hesum enda í misnýtslu av einum ella øðrum slagi og liva av almennum veitingum.

Henriette Kjær sigur við grønlendska útvarpið, at tað er umráðandi, at grønlendingar fáa at vita, at alt er ikki rósureytt í Danmark, áðrenn teir fara avstað. Hon sigur, at stjórnin hevur sett sær fyri at játta pengar til at hjálpa grønlendingunum, sum koma illa fyri í Danmark. Eitt nú skulu teir fáa hjálp til at fáa arbeiði og bústað, samstundis sum fólk skulu setast at virka sum tulkar, tá grønlendingar koma á almannastovurnar í Danmark.

# Líka vandamikið sum rúsdrekka

Kanningar í Danmark vísa, at ein bilførari, sum tosar í fartelefon, er líka vandamikil í ferðsluni sum ein, ið hevur drukkið meiri, enn loyvt er.

Hetta ætla danska ráðið fyri ferðslutrygd og løgreglan sær at gera nakað við. Í Keypmannahavn sigur Jan Dreyer Holt, varapolitikommiserur, at ein bilførari, sum tosar í fartelefon, ger somu mistøk í ferðsluni sum ein, ið hevur fingið ov nógv at drekka. Ferðin fer upp og niður, bilurin er ikki so stúttur á vegnum, og bilførararnir gloym at blunka, tá teir skulu snara, sigur hann.

Í ráðnum fyri ferðslutrygd siga tey tað sama. Stjórin, Rene La Cour Sell, sigur við danska útvarpið, at danir hava ein sera óhepnan atburð í ferðsluni, og at tað er neyðugt at fáa fólk at skilja, at bilurin eisini er eitt drápsamboð. Tað snýr seg um lív og syndarligar lagnur, sigur hann.

# Bono hóttur við lívinum

Bretska løgreglan Scotland Yard hevur sett fleiri av sínum monnum at verja tann kenda U2-tónleikaran Bono, eftir at hann hevur fingið eina rúgvu av hóttanarbrøvum.

Løgreglan sigur, at Bono hevur fingið 24 brøv, har hann verður hóttur við lívinum, men illgruni er um, at øll tey 24 brøvini eru frá sama manni. Sambært blaðnum Sunday Times heldur brævskrivarin, at Bono ger ov nógv burtur úr at hjálpa fólki í tí fátæka partinum av heiminum, og at hann heldur átti at hjálpt fátækum bretum. Øll brøvini eru stemplað á einum posthúsi í landssynningspartinum av London.

Amerikansku myndugleikarnir halda, at Bono kann vera eitt álopsmál hjá yvirgangsmonnum. FBI sigur, at summir víðgongdir islamskir felagsskapir hava ta kendu rockstjørnuna á einum serligum deyðslista.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# SARS-virusið kann gerast uppaftur verri

**Heimsheilsustovnurin WHO ávarar aftur um SARS. Hildið verður, at virusið kann broyta seg, so tað verður uppaftur hættisligari**

SARS
*Árni Joensen:*

Higartil hava granskarar hildið, at SARS-virusið var rættiliga støðugt, men nú ávara granskarar hjá WHO um, at virusið kann gerast uppaftur hættisligari, enn tað hevur víst seg at vera, síðani tað fyrstu ferð varð staðfest.

Á einari ráðstevnu í Singapore um vikuskiftið segði Marie-Paule Kiney hjá WHO, at SARS-virusið mennist, og at tað er neyðugt hjá granskarunum at kanna tað nærri og at halda eyga við møguligum broytingum. Summir granskarar halda, at virusið hevur serlig evni til at laga seg eftir ymsum umstøðum, og at tað mennist nógv skjótari enn higartil hildið.

Higartil eru 804 fólk deyð av SARS, og umleið 8.400 hava havt ella hava sjúkuna. Seinastu tíðina eru tilburðirnir fækkaðir nógv, men hava granskararnir hjá WHO rætt, kann sjúkan fara at taka seg uppaftur og tá kanska sum ein uppaftur verri sjúka enn higartil.

# Siamesiskir tvíburðar



*Sunnudagin átti ein kvinna í landspartinum San Juan har norðuri í Argentina tríburðar, tríggjar gentur. Tvær teirra eru siamesiskir tvíburðar. Tær hava sama hjarta og somu lungu, men hvør sín heila*

# Út í rúmdina at ferðast

**Kundi tú hugsað tær at sloppið eina ferð út í rúmdina? Tað ber til nú, men ferðaseðilin kostar 130 milliónir krónur**

FERÐAVINNA
*Árni Joensen:*

Russiska rúmdarleiðslan Rosaviakosmos hevur nú skrivað undir sáttmála við amerikansku rúmdarfyritøkuna Space Adventure um at senda ferðafólk út til altjóða rúmdarstøðina ISS at ferðast.

Ferðin út hagar verður við einum fari av slagnum Soyus TmA, og tann fyrsta ferðin verður frá støðini í Balikonor í Russlandi á vári í 2005. Hetta er sama støðin, sum varð nýtt, tá heimsins fyrsti rúmdarmaður, Jurij Gagarin, varð skotin út í rúmdina. Heimsins fyrsti fylgisveinur, Sputnik, varð eisini skotin út haðani.

Russiska rúmdarverkætlanin hevur fingið munandi størri týdning og áhuga eftir vanlukkuna við amerikansku rúmdarferjuni Colombia fyrr í ár. Fyribils hava amerikanararnir steðgað allari flúgving og nýta nú russisk rúmdarfør til samskiftið við ISS.

Higartil hava tveir ferðamenn verið úti í rúmdini. Í 2001 var tað amerikanski ríkmaðurin Dennis Tito og í fjør suðurafrikanarin Mark Shuttleworth. Ætlanin var, at tveir amerikanarar skuldu eisini fara út í rúmdina at ferðast í fjør, men tað varð av ongum, tí teir megnaðu ikki at rinda ferðaseðilin.

Og tað er heldur ikki so lætt, tí ferðin og uppihald á ISS í tíggju dagar kostar 130 milliónir krónur.


